## Úrslit av Maleisisku koyringini á Sepang

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Giancarlo Fisichella | Renault | 10 |
| 2 | Fernando Alonso | Renault | 8 |
| 3 | Jenson Button | Honda | 6 |
| 4 | Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes | 5 |
| 5 | Felipe Massa | Ferrari | 4 |
| 6 | Michael Schumacher | Ferrari | 3 |
| 7 | Jacques Villeneuve | Sauber-BMW | 2 |
| 8 | Ralf Schumacher | Toyota | 1 |
| 9 | Jarno Trulli | Toyota | |
| 10 | Rubens Barrichello | Honda | |
| 11 | Vitantonio Liuzzi | STR-Cosworth | |
| 12 | Christijan Albers | MF1-Toyota | |
| 13 | Tiago Monteiro | MF1-Toyota | |
| 14 | Takuma Sato | Super Aguri-Honda | |
| - | Christian Klien | RBR-Ferrari | |
| - | Scott Speed | STR-Cosworth | |
| - | Nick Heidfeld | Sauber-BMW | |
| - | Yuji Ide | Super Aguri-Honda | |
| - | Mark Webber | Williams-Cosworth | |
| - | David Coulthard | RBR-Ferrari | |
| - | Nico Rosberg | Williams-Cosworth | |
| - | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | |

HM fyri koyrarar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Spania | 18 |
| 2 | Michael Schumacher | Týskland | 11 |
| - | Jenson Button | Ongland | 11 |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Italia | 10 |
| 5 | Juan Pablo Montoya | Kolumbia | 9 |
| 6 | Kimi Räikkönen | Finnland | 6 |
| 7 | Felipe Massa | Brasilia | 4 |
| 8 | Mark Webber | Avstralia | 3 |
| 9 | Nico Rosberg | Týskland | 2 |
| - | Jaques Villeneuve | Kanada | 2 |
| 11 | Christian Klien | Eysturríki | 1 |
| - | Ralf Schumacher | Týskland | 1 |

**HM fyri lið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Renault | 2 | 8 |
| 2 | McLaren-Mercedes | 1 | 5 |
| - | Ferrari | 1 | 5 |
| 4 | Honda | 1 | 1 |
| - | Williams-Cosworth | 5 | |
| 6 | Sauber | 2 | |
| 7 | Red Bull Racing Ferrari | 1 | |
| - | Toyota | 1 | |

# Fisichella vann í Kuala Lumpur

**Giancarlo Fisichella hevði eitt nærum fullkomið vikuskiftið, tá hann vann formel 1 koyringina á Sepang breytini frá fystu byrjuanastøðu. Hitin var einasti veruligi avbjóðarin hjá italiumanninum.**

FORMEL 1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




*Fisichella fekk eitt væl uppiborið sjampanjubað*
*(mynd: Scanpix.dk)*

Giancarlo Fisichella endaði eitt fullkomið vikuskifti við einum sigri í formel 1 koyringini á Sepang breytini í Kuala Lumpur. Hann byrjaði fremstur, og hyggja vit burtur frá teimum løtunum, tá hann hevði verið í pitt, og liðfelagin Alonso ikki hevði verið innið enn, so var hann á odda alla koyringina. Hann vann trygt framman fyri liðfelaganum Alonso og Jenson Button í Honda á triðja plássi.

### Styrkisvenjing í einum hitarúmi

Men hóast tað sá lætt út hjá italiumanninum, avdúkaði hann á tíðindafundinum, at hann hetta hevði verið bæði kropsliga og andaliga sera torført. Hitin á Sepang breytini er øgiligur, og hóast lufthitin einans var 32 hitastig sunnudagin í mun til væl heitari dagar fríggjadagin og leygardagin, so var hetta sum at gera styrkivenjing í einum hitarúmi. Fisichella viðgekk, at hitin veruliga byrjaði at gerast óliviligur, tá helvtin av koyringini var koyrd, men tað hjálpti, at Jenson Button og Fernando Alonso vóru tætt aftan fyri hann alla koyringina, tí so noyddist hann at geva seg fullkomiliga alla koyringina, og hevði ikki tíð til at lata hita veruliga knúlva seg..

### Speed gloymdi speglini

Button lá væl fyri til annað pláss alla koyringina, men Renault tyktust á degnum, at hava ein betri bil. Hetta blandað við, at nýggi amerikanski formel 1 koyrarin Scott Speed gloymdi at brúka speglini, og ikki lat Button sleppa framvið í eini avgerandi løtu, kostaði honum triðja plássið.

### Räikkönen aftur óheppin

Dagurin hjá finska varaheimsmeistarinum í formel 1 Kimi Räikkönen endaði tíðliga. Finnin var sera ónøgdur aftan á koyringina og greiddi frá at Christian Klien hevði rent á seg. Sjónvarpsmyndirnar vóru ikki serliga greiðar og Christian Klien vildi vera við, at talan var um ein samanstoyt, ið báðir áttu líka stóra skuld í. Hetta endaði koyringina hjá Räikkönen og hóast Klien aftan á eina langa løtu í pittinum kom aftur á breytina, koyrdi hann bert fá umfør afturat, áðrenn hann noyddist at gevast.

### Kostnaðarmikilt innanhýsis stríð

Williams byrjaðu á triðja og fjóra plássi, men hart innanhýsis stríð um triðja pláss, og ein rakettbyrjan av Fernando Alonso, gjørdu, at Nico Rosberg endaði niðrið á sjeynda plássi og Webber á fjóra. Men báðir vóru væl við stríðnum um fremstu plássini við nógvari ferð. Men á sætt umfarið brendi motorurin hjá Nico Rosberg saman. 10 umfør seinni var tað motorurin hjá Webber, ið gav upp.

### Massa syfti Schumacher

Felipe Massa megnaði at taka fimta pláss beint framman fyri liðfelagan Michael Schumacher. Hetta hóast Massa byrjaði aftastur og Michael Schumacher byrjaði á fjúrtanda plássi. Men við eini frálíkari strategi við einum steðgi, megnaði Massa at koma upp á fimta pláss. Hóast Schumacher lá í hølunum á honum í fleiri umfør, slapp hann ikki framvið.

Regnið lúrdi alla tíðina í tungum myrkum skíggjum, og eina løtu duttu nakrir dropar, men veruligt regn gjørdist ongangtíð talan um.

# VÍF greipuvinnarar dreingir 10 A



*Greipuvinnandi liðið og venjarin Daniel Rapa*

*mynd: Heidi Petersen*

Hesir knassarnir hjá VÍF vunnu í dag steypafinaluna fyri dreingir 10 A, sum var spæld í høllini í Runavík móti H71. Við sigrinum í dag gjørdust teir greipuvinnar í ár.

Teir vunnu nevniliga eisini føroyameistara finaluna fyrr í mánaðinum. Finalan í dag var annars sera spennandi, eftir vanligu leiktíðina stóð á jøvnum millum VÍF og H71, 5 - 5, Men í umdystinum tóku VÍF dreingirnir dik á seg, og tá umdysturin var av, var støðan 8 - 5 til VÍF, og harvið var sigurin í húsi.

Daniel Rapa hevur vant dreingir 10 A hjá VÍF í vetur.

**nud**

# VÍF Føroyameistarar dreingir 14 ár



*Vestmannadreingirnir vóru ikki sørt ernir, tá teir eftir dystin fingu gullmerkini um hálsin*

Vestmenningar tryggjaðu sær Føroyameistaraheitið fyri dreingir 14 ár í Hoyvíkarhøllini í gjár, tá teir vunnu uppiborið 21-14. Undan dystinum var H 71 2 stig frammanfyri VÍF, um Vestmenningar skuldu tryggja sær meistaraheitið var neyðugt hjá teimum at vinna dystin.

Tað vísti seg frá byrjan at Vestmenningar vóru sera uppsettir. VÍF byrjaði betur og legði seg á odda beinanvegin. Hálvleiksstøðan var 11 - 6 til VÍF.

Venjari hjá Vestmannadreingjunum er Palli Joensen.

Hoyvíkingar høvdu gjørt rættiliga nógv burturúr í høllini, karmarnir vóru til ein rættiligan toppdyst.Okkara einasta altjóða dómarapar, Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen dømdu dystin, og ungdómar úr bæði Vestmanna og Hoyvík høvdu gjørt seg út við trummum, hornum og andlitsmáling, fyri at heppa sínum liði.